# Er Bibelen virkelig Guds ord?

**JØRN NIELSEN**

H.C. Lumbyes Vej 159A,
DK 4700 Næstved

Bibelen bedømmes af mange teologer som en bog, der kan indeholde Guds ord, men er i sig selv ikke Guds ufejlbare, inspirerede ord.

Dertil er kun at sige, at hvad teologer siger om Bibelen, betyder intet. Hvad Bibelen siger om sig selv, betyder alt. Her er Bibelens svar: "Den ganske skrift er indblæst af Gud og gavnlig til at belære, til at irettesætte, til at genoprejse, til at optugte i retfærdighed." 2. Tim. 3:16. Gud har ikke bare åndet på Bibelens ord, men Han ånder også på os, når vi læser det, sagde en gang den lærde teolog, Hugo Odeberg.

Det er ikke os, der skal fælde dom over Guds ord, sådan som lærde teologer ivrer efter at gøre i de trykte spalter (den danske avis, Kristeligt Dagblad, giver så megen spalteplads til den slags, at mange troende er begyndt at kalde den for "U-Kristeligt Dagblad), men "Han, som troner i Himlen, *ler*" (Psa. 2:4) ad dette ynkværdige åndshovmod. Nej, sandheden er, at "Guds ord er levende og virkende og skarpere end noget tveæggeet sværd og trænger så dybt ind, at det sønderdeler sjæl og ånd, marv og ben og er dommer over hjertets tanker og meninger." (Hebr. 4:12). Det er altså Guds ord, der dømmer os og ikke omvendt.

I 2. Pet. 1:21 læser vi: "Aldrig er nogen profeti fremgået af et menneskes vilje, men drevet af Helligånden udtalte mennesker, hvad de fik fra Gud." Sådan tror vi, at både det profetiske ord og Skriften iøvrigt blevet til. Uanset hvor menneskelige, Bibelens bøger ser ud, er det Helligånden, der har drevet mennesker til at udtale i hvert eneste skrift, hvad Gud ønskede, der skulle skrives. Helligånden står heldigvis langt over enhver teologi-professor. Forfriskende var det, hvad Indre Missions høvding, Vilh. Beck, med klar røst sagde på en teologisk konference i 1896 i København: "*På knæ for Bibelen, professorer!*"

Læg mærke til at der på Bibelens sidste side advares mod at lægge noget til eller tage noget fra *ordene* i den profetiske bog (Åb. 22:18-19). Herren er nøjeregnende med hvert ord. Det er derfor vi går i brechen for verbalinspirationen af Bibelen, dvs. den ord til ord inspirerede tekst.

Vi skal altså ikke konsultere noget menneske om, hvad der i Bibelen skal godtages som Guds ord. Bibelen indeholder ikke bare Guds ord, den er Guds ord. Når gudfrygtige bibellæsere samtaler om deres oplevelser med Guds ord, bliver det ofte sagt: "Er det ikke underligt? Nu har jeg læst i Bibelen i mange år, og jeg bliver ved at "se" noget nyt i Guds ord!" Ja, det er netop et stærkt vidnesbyrd om, hvor levende Guds ord er og hvor aktuelt og nærværende Helligånden stadig gør det for vore hjerter.

Dwight L. Moody, den navnkundige amerikanske evangelist, sagde kort før sin død: "Det 20. århundredes prædikant vil være den mand, der åbner sin Bibel og forkynder ud fra den!" Jeg har i vor tid lagt mærke til en kedelig tendens, der har bredt sig i det 21. århundredes forkyndelse: I stedet for at stå for Guds ansigt med et budskab fra Hans ord, går tendensen ofte i retning af at *causere*, dvs. snakke muntert og underholdende for at vinde bifald hos mennesker. Sådanne modeprædikanter advarer apostlen imod. Se 2. Tim. 4:3.

Måtte der endnu i vor tid fremstå forkyndere, som bæver for Hans ord (Es. 66:2), og som er oplærte ved Mesterens fødder.

# Skeiv tíðindi í Dimmalætting

**Aftursvar frá arbeiðsbólki fyri konserthús í Tórshavnar kommunu viðv. Grein hjá Arna Zachariassen um Perluna**

**Tann 14. juli var grein í Dimmalætting, har tað varð skrivað um nýggju Perluna í Havn. Tað var Arni Zachariassen, sum hevði tosað við varaborgarstjóran Boga Andreassen.**

**Arbeiðsbólkurin fyri konserthús í Tórshavnar kommunu metti ikki, at greinin kundi standa ósvarað vegna faktuellar villur**

Vit mettu ikki, at tað var journalistiskt nøktandi av Dimmu, bert at lýsa ta einu síðuna av málinum og tískil ringdu vit til Arna Zachariassen, og bóðu hann skriva eina grein, har okkara sjónarmið eisini kom til sjóndar.

Ígjár, 12. august, kom hendan grein í Dimmu, næstan ein heilan mánað seinkað. Eftir at hava lisið greinina, leggja vit í arbeiðsbólkinum til merkis, at tað ikki er stórvegis samsvar millum tað, ið var borið fram í Dimmu og tað, ið veruliga fór fram undir samrøðuni millum Arna og arbeiðsbólkin. Har eru tápuligar feilsiteringar sum: »Heðin er tann dummi« og generelt nógvar misskiljingar, ið geva eina fullkomuliga skeiva mynd av tí, ið fór fram undir samrøðuni.

Fyri tað fyrsta, so kemur greinin tríggjar vikur ov seint í blaðið, og er nógv hent síðani tá, ið ger, at greinin ikki er aktuel.

Fyri tað næsta, so eru fleiri skeivar endurgevingar og beinleiðis andsøgnir í mun til tað, ið veruliga varð sagt.

Fyri tað triðja, so var greinin eitt aftursvar til greinina hjá Boga Andreassen. Samrøðan millum arbeiðsbólkin og Arna fór fram á tann hátt, at vit siteraðu úr greinini og svaraðu so punkt fyri punkt. Hetta sæst ikki aftur í aftursvarinum frá arbeiðsbólkinum, og meta vit tískil, at greinin manglar dýpd og er rættiliga óskiljandi.

Til seinast, so bóðu vit Arna senda okkum greinina, áðrenn hon fór til prentingar, soleiðis at ongar misskiljingar skuldu vera. Vit fingu ongantíð greinina, hóast Arni lovaði okkum at senda okkum greinina.

**Nakrar av misskiljingunum**

Arni skrivar: - *»Tónleikararnir, teir, sum húsið í stóran mun er ætlað til, vóru ikki tiknir upp á ráð frá byrjanini. Teir fingu einans at vita, hvat kommunan ætlaði, eftir at ætlanirnar vóru komnar upp á pláss og arbeiðið longu var byrjað."*

Hetta er ikki rætt. Vit vóru við frá byrjanini og komu við krøvum til eitt tílíkt hús. Trupulleikin var tann, at býráðið als ikki tók hesi krøv til eftirtektar og byggir í staðin eitt hús, ið als ikki lýkur altjóða krøv eins og okkara egnu krøv.

Arni skrivar: - *»Tónleikararnir leggja tó at enda dent á, at teir einki hava ímóti Boga Andreasen. Bogi er ein knassi. Vit hava havt gott samstarv við hann fyrr og vænta einki minni í framtíðini. Tað er Heðin Mortensen, sum er tann dummi.«*

Hetta er beinleiðis lygn. Eingin av okkum hevur sagt hetta. Vit hava ongantíð sagt, at Heðin er tann dummi. Hetta hevur Arni sjálvur funnið uppá. Vit hava eins og við Boga, havt eitt útmerkað samstarv við Heðin. Vit søgdu hinuvegin, at vit als einki høvdu í móti hvørgum av teimum og at vit bæði so og so ynsktu samstarv framyvir.

Vit søgdu, at vit sjálvandi vóru skuffaðir yvir núverandi støðu, men at vit ynsktu gott samstarv við Býráðið framyvir.

Arni skrivar: - *»Á seinasta fundinum varð alt sligið í jørðina, og vit vóru aftur á null. Hvat annað hevði nakar væntað, enn eina kraftiga reaktión, sigur Ólavur Olsen sjónliga ørkykladur.«*

Sum tað verður skrivað í greinini, gevur hendan útsøgn lítla og onga meining. Hetta var sagt í samband til greinina hjá Boga, har hann heldur tað vera sera óseriøst av arbeiðsbólkinum at gera ein Facebook bólk, har teir vísa sína ónøgd. Hetta verður als ikki nevnt í greinini.

Í fyrru greinini sigur Bogi: *»Eg kann bara koma til niðurstøðuna, at tónleikaumhvørvið ikki standur saman. Av tí sama fáa politikkarar eingi greið boð frá tónleikarunum og soleiðis koma støður sum handan fyri, har tað, sum politikkararnir endiliga gera, verður skotið niður.«*

Til hetta vístu vit aftur, at tónleikaumhvørvið ikki stendur saman og greiddu frá, hvussu nógv tónleikafeløg arbeiðsbólkurin umboðaði, og hvussu vit bæði á ein og annan hátt vóru komin við í býráðið við greiðum boðum. Hetta kemur heldur ikki fram í greinini hjá Arna.

Samanumtikið hevði verið betri, um henda grein ikki var komin við í Dimmu. Vit halda tað vera óheppi, at vit ikki fingu møguleika at síggja greinina, áðrenn hon varð prentað.

Vit vóna tó ikki, at hetta kemur at ávirka samstarvið millum arbeiðsbólkin og Tórshavnar Kommunu.

**Ólavur Olsen,**
**Hergeir Stakksberg og**
**Rógvi á Rógvu**

# Eingin nevnir tað góða í pakkanum!

**SÓLVIT NOLSØ**

lesandi



**Eg veit, at politikkur er konfliktir og at orðaskiftir skulu til fyri at vísa á skeivleikar, ið kunnu verða, men eg haldi, at nógv góð punkt eru í ólavssøkupakkanum, men eingin tosar um tey**

Eg skal beinavegin vísa á ymisk góð elementir í pakkanum, ið eg haldi skulu nevnast:

- Útbyggingarnar av sjúkrahúsinum halda fram, og ein nýggj krabbameinsætlan er ávegis.
- Vísindaráðið er farið til verka. Nýggjur og miðvísur granskingarpolitikkur er á veg.
- Ein serfrøðingabólkur kannar, hvussu vit kunnu fáa best møguliga tilknýtið til ES.
- Játtanin til marknaðarføring av Føroyum hækkar við 10 mió.

Hetta eru bert fýra punkt, ið eg haldi hava uppiborið rós. Tað eru enn fleiri viðurskifti enn tey, ið eg nevni her, ið verða betraði av ólavssøkupakkanum, men eingin nevnir tey ella gevur sær far um tey.

Eg vil her geva eina áheitan til øll um at lesa hetta uppskot, so øll ikki koma við so skallutum álopum, eins og tey frá Høgna Hoydal eru blivin! Eftirhondini er hann farin at reksa upp í saman um alt, sum hann sigur verða galið. Í veruleikanum haldi eg, at hann fjalir dulda gleði yvir henda progressiva pakka hjá samgonguni, men hann roynir sum frægast at goyma tað. Hægri skattir plagdu í øllum førum at kunnu gleða tjóðveldisfólk, men kanska er tað avgerðin um at lata privatar byggja Skálafjarðatunnilin, ið smakkar so illa?

